

*Mangt bendir á, at tað fer at slitna millum reiðarar og manningarfeløgini í samráðingunum seinnapartin í dag. – Samráðingarnar hava ikki gingið væl væl, sigur Terji Sigurðsson, semingsmaður*



*Terji Sigurðsson, semingsmaður, var ikki bjartskygdur, tá Sosialurin tosaði við hann beint fyri middag í dag*

# úr ES

samráðingarnar slitnaðu. Tað einasta, vit hoyra, er tað, sum fjølmiðlarnir siga, og tá eru tað serliga skotsk áhugamál, sum eru at síggja í miðlunum.

Jacob Vestergaard sigur, at Fiskimálaráðið ongar fráboðanir hevur fingið úr ES um, at felagsskapurin ætlar at sekta Føroyar ella føroysk skip fyri, at vit – eins og øll hini standalondini hava gjørt – fara at áseta okkara egnu makrelkvotu fyri 2011.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað hevur verið frammi, at ES møguliga fer at seta tiltøk í verk móti íslendskum skipum. Hinvegin hevur einki ítøkiligt verið at hoyrt um, at ES ætlar sær at sekta Føroyar og føroysk skip*



*- Kvoturnar, sum ES, Noreg og Ísland hava tillutað sær, eru omanfyri TAC'ið, ið ICES mælir til, og tað er hvørki skilagott ella haldbart í longdini, sigur Jacob Vestergaard*

# Fara nú at áseta kvotu

## Jacob Vestergaard ætlar sær seinni í hesum mánaðinum at áseta, hvussu stór føroyska makrelkvotan verður í hesum árinum

Vilmund Jacobsen

Føroyar er einasta landið í sonevnda strandalandasamstarvinum um makrel, sum enn ikki hevur ásett, hvussu stór kvotan skal vera í hesum árinum.

Fyrsta landið, sum tók seg úr samráðingunum, tá tað vísti seg, at ov lítið fór at koma burtur úr, var Ísland, sum ásetti sær 17% av eini heildarkvotu á 646.000 tons, ið er tilráðingin hjá ICES.

Stutt eftir ásettu ES og Noreg sær heili 90% av heildarkvotuni.

Føroyar, sum heldur ikki kundu semjast við ES og Noreg í samráðingunum um avtaluna fyri 2010, tillutaðu sær 15% av heildarkvotuni í fjør.

Í løtuni er tað bara Føroyar, sum ikki hevur ásett sær sína makrelkvotu fyri 2011.

- Men tað verður gjørt heilt skjótt – og helst seinni í hesum mánaðinum, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Spurdur, um tað kanska er taktikkur frá føroyskari síðu, at ásetingin bíðar til eftir samráðingarnar um sínámillum fiskiveiðiavtalu við Noreg, sigur landsstýrismaðurin, at tað er tað ikki.

- Vit hava sum so ikki nakað serligt at skunda okkum til, tí mett verður, at besta tíðin til makrel í føroyskum sjógvi er ikki fyrr enn nakað er liðið av árinum.

Jacob Vestergaard sigur, at Fiskimálaráðið í kunngerð fer at áseta, hvussu stór kvotan verður í 2011, og hvussu kvotan skal lutast millum skipabólkar.

### Støðan mýkjast

Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at støðan, sum hevur tikið seg upp í strandalandasamstarvinum, má mýkjast, soleiðis at londini skjótast gjørligt kunnu finna semju um, hvussu býtið skal verða frameftir.

- Tað kann ongantíð vera rætt, at umsitingin av hesum tilfeingi bara hongur í leysum lofti. Tí er umráðandi, at støðan landanna millum verður mýkt.

Jacob Vestergaard vísir á, at kvoturnar, sum ES, Noreg og Ísland hava tillutað sær, eru omanfyri TAC'ið, ið ICES mælir til, og tað er sjálvandi hvørki skilagott ella haldbart í longdini.

*vilmund@sosialurin.fo*